# Ferðasíðan

62°N







# NJÓTIÐ HEYSTFRÍTÍÐINA Á AZORUNUM

## 10. okt. - 26. okt. 07

**Dreymaferðin við náttúruupplivingum í heimsklassa**

Azorunar eru 9 portugiskar oyggjar í Atlantshavinum við uml. 240.000 íbúgvum. Oyggjarnar eru vorðnar til av eldgosi, og alt økið er eitt stórt fjallalendi, har einans fjallatoppar koma undan vatnskorpuni í Atlantshavinum. Oyggjarnar hava ríkt fugla-og plantulív, og havsins ríkidømi er sera fjølbroytt við bæði delfinum, hvalum og skjaldbøkum.

Flestu ferðafólkini vitja á oynni Sao Miguel, har uml. 130.000 fólk búgva. Náttúrudýrgripirnir eru ótrúligir og mugu upplivast t.d einastandandi gosfjallasjógvarnar Sete Cidades, Fogo og Furnas. Heitar keldur og sera vakri, romantiski, botaniski havin, Terra Nostra. Høvuðstaðurin eitur Ponta Delgade, og er ein sera hugnaligur, blómufagur býur við uml. 27.000 íbúgvum. Býurin hevur eina stóra og innbjóðandi marinu, har sjófólk úr øllum Europa koma.

Azorunar hava nógv at bjóða, bæði av stórfingnum náttúruupplivingum og frítíðarítrivum t.d. golf, windsurfing, jetski, siglitúrar, hval-og delfinsafari og fisking á djúpum havi.

Útferðarmøguleikarnar eru fjølbroyttir og spennandi. Mælt verður til, at bíleggja útferðir saman við ferðini, orsaka av avmarkaðum plássi.
Ring til okkara at fáa meira at vita um útferðarmøguleikar ella far inn á www.bravotours.dk

Miðalhitin á Azorunum í oktobur er uml. 23 hitastig um dagin







## Hotel Acores Atlantico ***+

er vælhildið og nýrenoverað hotel, ið liggur sera væl fyri á havna promenaduni í Ponta Delgade.

Dupultrúmini hava air condition, telefon og fylgisveinasjónvarp. Nøkur hava balkong.

Hotellið hevur matstovu, elevator, piano barr, venjingar høli, innandura svimjihyl og sauna.

Prísur fyri vaksin

**Kr 8.890,-**

fyri hvønn í dupultrúmi (min. 2 fólk)

**Íroknað prísin er:**
Retur ferðaseðlar Vágar – Keypmannahavn – Azorunar við øllum avgjøldum.

Flutningur millum flogvøllin og hotellið.

Innivist í dupultrúmi á Hotel Acores Atlantico v/ morgunmati í 14 dagar.

**Gisting í Keypmannahavn á út og heimferðini er ikki við í prísinum.** Hetta vilja vit tó fegin hjálpa við, um tit ynskja tað.

**Ferðaskrá**

| | | |
|---|---|---|
| 10.10.07 | fráferð úr Vágum til Keypmannahavnar | kl. 08.15 |
| 11.10.07 | fráferð úr Keypmannahavn til Ponta Delgada | kl. 06.45 |
| 25.10.07 | fráferð úr Ponta Delgada til Keypmannahavnar | kl. 10.45 |
| 26.10.07 | fráferð úr Keypmannahavn til Vágar | kl. 12.30 |

ATLANTIC AIRWAYS

BRAVO TOURS - ferie på dansk

62°N

**Hoydalsvegur 17 • FO-100 Tórshavn**
**Tel: 34 00 00 • Fax: 34 00 11 booking@ff.fo**
**www.62n.fo**